# Fjølmiðlanevndin - avgerðir

| Mál nr. :<br>16/00188 | Lóg :<br><br>§ 43 í løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2007.<br><br>Leiðreglur um góðan fjølmiðlasið frá 14. mai 2008. | Avgerð tikin:<br>18.07.2016 |
|---|---|---|


**Samandráttur:**
A kærir um grein í vikublaðnum 9. mai 2016, sum er skrivað av DD. Greinin er um hana og er grundað á eina framløgu, sum hon hevur havt á eini ráðstevnu hjá KRIS 28. apríl 2016 í Norðurlandahúsinum.

Samanumtikið viðmerkir nevndin, at talan er um eina almenna ráðstevnu, sum Vikublaðið kann endurgeva frá, uttan loyvi og kunning til tey, sum hava framløgur á ráðstevnuni.

Tá talan er um eitt viðkvæmt evni, átti Vikublaðið tó at verið meira vandið í mun til innihaldið í greinini og átti at eftirkanna, um upplýsingarnar vóru rættar. Vísast kann ikki beinleiðis til eina áseting í leiðreglunum, men tað er grundleggjandi fyri fjølmiðlayrkið, at upplýsingar, som vera bornar, skulu vera sannar. Tá Vikublaðið hevur bjóðað kæraranum eina samrøðu, so upplýsingarnar kunnu rættast, vil nevndin tó ikki finnast at hesum viðurskifti.

Eisini átti Vikublaðið at gjørt vart við, at framløgan var um eitt brotsmál, og at ongin er ákærdur ella dømdur í hesum máli. Nevndin finst at hesum, og er hetta ikki í tráð við góðan fjølmiðlasið. Vísast kann til punkt 4.5 í leiðreglunum.

Annars hevur nevndin ongar viðmerkingar til málið.


A kærir um grein í vikublaðnum 9. mai 2016, sum er skrivað av DD. Greinin er um hana og er grundað á eina framløgu, sum hon hevur havt á eini ráðstevnu hjá KRIS 28. apríl 2016 í Norðurlandahúsinum.

## Kærarin

A kærir um, at hon er framstillað í vikublaðnum uttan at vera eftirspurd.

Við tað, at tað er hennara yrki at virka sum Avhengigheitsráðgevi og Psykoterapeut, er tað umráðandi at fólk ikki fáa skeiva fatan av tí hon stendur fyri, tað kann vera til óbøtandi skaða fyri hennara virksemi.

# Fjølmiðlanevndin - avgerðir

Talan er um tvey viðkvom, skamfull og persónlig evni, sum kynsligur ágangur og alkoholisma. Hon verður útstillað á forsíðuni hjá vikublaðnum við mynd, sum er tikin av henni uttan hon veit av tí, og við fullum navni, uttan at vera eftirspurd ella yvirhøvur fingið at vita, at hon er á forsíðuni. Øll síða 4 í blaðnum er um hana. Har er teksturin skrivaður á ein sovorðnan hátt, at tað ljóðar sum DD/vikublaðið, hava tosað við hana persónliga, hvat hvørki av teimum hava. Hon fekk sjokk tá hon fekk hetta at vita, at hon lá á hvørjum køksborði í Føroyum uttan at vera eftirspurd ella yvirhøvur fingið at vita, at hon er á forsíðuni. Hon følir tað sum stóra skemd og óverduga framferð móti henni sum persóni.

Evnið  hann hevur valt at skriva um er kynsligur ágangur og alkoholisma. Hetta skrivar hann, eftir at hann hevur verið til ráðstevnu hjá KRIS í Norðurlandahúsinum. Á somu stevnu har hon varð biðin um at hava eitt persónligt upplegg um sítt lív.

Kærarin hevur sett kæruna upp í punktform, og hevur viðlagt greinina har hon hevur markerað, hvat hon klagar um.

Punkt 1. Mamma tordi ikki at trúgva mær.

Yvirskriftin, har skrivar hann, at mamman tordi ikki at trúgva henni. Hetta passar ikki. Hon trúði henni, men tordi ikki at handla.

Punkt 2. Tá A.

Tá greinin byrjar, hevur hann valt at framheva sítt navn saman við innganginum

Punkt 3. Myndin í samband við greinina.

Mynd tikin av kæraranum og brúkt uttan at hon fær tað at vita.

Punkt 4. ”Rúsdrekkatrupulleikin hjá mær var eitt symptom og ikki grundleggjandi trupulleikin. Tað var kynsliga misbrúkið, ið fekk meg at drekka, sigur A. Mynd: DD.”. Teksturin undir mynd, hetta er rættuliga skaðiligt fyri hennara fyritøku, tí hetta hevur hon ongantíð funnið uppá at sagt. Hon arbeiðir sum avhengigheitsráðgevi og Psykoterapeut, og hatta stríður beinleiðis ímóti tí hon stendur fyri.

Punkt 5. Tað eru einans nakrir fáir mánaðir síðani A valdi at bróta tøgnina og siga sína søgu. Tað var á einum fundi, sum Kris skipaði fyri í heyst. 28. apríl skipaði Kris aftur fyri eini ráðstevnu um kynsligan ágang og tá fortaldi A aftur sína søgu, um hvussu hon var vorðin misbrúkt av fleiri monnum, hvussu tað hevði oyðilagt hennara sjálvsfatan og hvussu mamman ongantíð tordi at trúgva henni.

Her sigur hann, at tað er aðru ferð hon sigur frá um henda partin av síni søgu. Hetta burdi verið nokk fyri ein persón til at skilt, at so leggur man ikki slíkt út alment, uttan at spyrja um loyvi.

Punkt 6. Hetta oyðilegði meg og gav mær eina skuldarkenslu alt lívið. Í tannárunum seldi eg meg sjálva til eldri dreingir. Eg kendi jú longu alt til vaksnamanna sex, sigur A.

# Fjølmiðlanevndin - avgerðir

Her skrivar hann, at hann var tannáringur tá hon seldi seg til dreingirnar í grannalagnum. Hetta passar ikki. Hon var ein 7-9 ára gomul genta, sum gjørdi tað. Eitt barn og ikki ein tannáringur, og tað er ein himmalvíður munur. Hon følir tað sum eina niðurgering og krenking av tannáringinum.

Punkt 7. Misbrúkið leiddi at enda A út í druk og hon gjørdist alkoholikari. Hon ivast ikki í, at nógv teirra, ið hava rúsdrekka- og rúsevnistrupulleikar, høvdu verið betri hjálpt, um eitt heim varð fyri tey, ið høvdu verið fyri kynsligum ágangi.

Eg havi ikki sagt, at tey sum hava alkohol- og rúsevnistrupulleikar, høvdu havt fingið betri hjálp um eitt heim var fyri tey kynsliga misnýttu. Hon er av tí áskoðan, at alkoholtrupulleikin má takast hond um fyrst, áðrenn aðrir trupulleikar kunnu viðgerast. Alkoholikarin misbrúkar alt, fyri at rættvísgera sítt drekkarí og hesum sjónarmiðum arbeiðir hon eisini eftir.

Punkt 8. Rúsdrekkatrupulleikin hjá henni var eitt symptom og ikki grundleggjandi trupulleikin. Tað var kynsliga misbrúkið, ið fekk hana at drekka. Hon væntar, at tað siga nógv, ið dylja sárini eftir kynsligt misbrúk við rúsdrekka og rúsevnum, sigur A.

Tað, hann skrivar her, er rættiliga skaðiligt fyri hennara fyritøku, tá hon arbeiðir við alkoholismu. Hann skrivar, at rúsdrekkatrupulleikin hjá henni var eitt symptom og ikki grundleggjandi trupulleikin. Tað var kynsliga misbrúkið, ið fekk hana at drekka.

Hetta hevur hon svarað honum aftur á Facebook og vísir hetta best hennara áskoðan á alkoholismu: *eg eri ikki alkoholikari tí eg bleiv misbrúkt, nei eg eri alkoholikari tí eg útviklaði alkoholismu, kynsligi ágangurin hevur kanska havt eina ávirkan á tað, men sum alkoholikari misbrúkti eg kynsliga ágangin, fyri at kunna drekka..*

Punkt 9. So var lættari at skúgva meg til viks.

Kærarin hevur ikki sagt, at tað var lættari hjá mammu hennara at skúgva seg til viks. Hon sigur í upptøkuni, at hon betalti prísin, tí hon ikki tordi at handla.

Punkt 10. Eg veit, at eg ikki eri tann einasta, ið havi verið fyri kynsligum ágangi. Eg veit, at eg ikki eri tann einasta, ið havi fingið rúsdrekkatrupulleikar av tí sama.

Hetta eru ikki hennara orð og ikki hennara sýn uppá alkoholismu.

Kærarin vil hava seg reinsaða fyri, at tað er hon, sum hevur úttalað seg soleiðis. Hon vil hava DD/vikublaðið at taka ábyrgdina av, at tey hava krenkað hana persónliga við ikki at biðja um loyvi, og enn minni sagt henni frá, at tey skriva um seg.

Hon vil hava eina almenna umbering í vikublaðnum við eini grein, har tað eisini verður greitt frá, at greinin er frítt skriva av DD, fyri hansara rokning, og eingin samrøða hevur verið við kæraran, og at kærarin hevur gjørt vart við, at greinin ikki lýsir hennara áskoðan á evnið.

Afturat vil hon hava grein í blaðið fyri teirra rokning av somu støðd sum greinin, sum hetta málið snýr seg um, har hon fær høvið at greiða frá síni søgu.

**Miðlahúsið**

Tann 21. apríl fekk Miðlahúsið innbjóðing frá Kris, sum bjóðaði teimum til ráðstevnu í Norðurlandahúsinum um kynsligan ágang.

Sama morgun, sum ráðstevnan var, tosaði DD, blaðmaður, bæði við dagliga leiðaran og forkvinnuna í Kris. Hetta gjørdi DD – hóast tað var ein almenn ráðstevna – fyri at tryggja sær, at hann hevði loyvi at endurgeva frá ráðstevnuni – sum jú er endamálið, tá ein fjølmiðil er við til slíkt. Báðar góvu lov til tess.

Umrødda grein er ein av 7-8 síðum, sum eru skrivaðar frá hesi ráðstevnu í Sosialinum og Vikublaðnum.

Umrødda grein var ein samandráttur av fyrilestrinum á ráðstevnuni. Sjálvandi kann alt ikki koma við, men blaðmaðurin royndi at fáa við tað, sum hann skilti sum tað týdningarmesta at fáa við. Hann royndi at halda fokus á, at tað ber til at gerast vinnari aftur, at tær ikki tørvar at liva í misbrúkinum og lata tað stýra tær, og tað er hjálp at fáa, góð hjálp.

Tað harmar tey, at kærarin heldur, at tey hava misskilt fyrilesturin. Men fyri at fáa greiðu á hesum, bjóðaði blaðmaðurin sær til at hitta kæraran og gera nýggja samrøðu, har misskiljingarnar kundu fáast uppá pláss. Men hon lat ikki frætta frá sær.

Vikublaðið heldur seg ikki hava brotið góðan fjølmiðlasið.

**Lógargrundarlag**

§ 43 í løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2007.

Leiðreglur um góðan fjølmiðlasið frá 14. mai 2008.

**Avgerðin hjá Fjølmiðlanevndini**

Til at viðgera hetta mál var Fjølmiðlanevndin mannað við AA, forkvinnu, og nevndarlimunum JJ, LL  varalimi DD.

Nevndin viðmerkir, at talan er um eina almenna ráðstevnu, sum miðlar sum útgangsstøði kunnu endurgeva frá. Hóast talan er um eitt viðkvæmt evni, metir nevndin ikki, at orsøk er til at víkja frá útgangsstøðinum um, at endurgevast kann frá ráðstevnuni og tað krevur ikki loyvi frá

kæraranum at endurgeva frá hennara framløgu á ráðstevnuni, ei heldur um talan er um eina forsíðugrein. Nevndin gevur tí ikki kæraranum viðhald í, at hon átti at vera spurd, um hennara framløga kundi endurgevast í Vikublaðnum.

Tað, sum er støðan í hesum máli er, at kærarin eyðsæð ikki er greið yvir, hvat hon gerst partur av, tá hon er partur av hesi ráðstevnu, og er hetta eisini eitt viðurskifti millum hana og Kris, um kunning í mun til týdningin av, at kærarin er partur av eini almennari ráðstevnu, og hvat tað kann innibera fyri hana.

Talan er tó um eitt viðkvæmt evni bæði í mun til kæraran persónliga og hennara yrki sum alkoholráðgevi og psykoterapeut, og skaðaárinini av skeivleikum kunnu vera stór. Hetta hevur við sær, at Vikublaðið eigur at vera vandið í mun til innihaldið í greinini og eigur at eftirkanna, um upplýsingarnar eru rættar. Tá Vikublaðið ikki hevur havt eina upptøku av framløguni at halda seg til, kann innihaldið bert eftirkannast við at tað verður eftirhugt av kæraranum, og Vikublaðið átti at sent kæraranum greinina at gera viðmerkingar til áðrenn greinin bleiv prentað.

At hetta ikki er gjørt, hevur havt við sær, at har eru skeivar upplýsingar í greinini, og eisini upplýsingar, sum ikki eru neyvar og kunnu hesar tí misskiljast, og er hetta ikki í tráð við góðan fjølmiðlasið, hóast tað ikki er møguligt at vísa til eina ítøkiliga áseting í leiðreglunum.

Kærarin hevur vent sær til Vikublaðið og gjørt vart við, at skeivleikar eru í innihaldinum í greinini, og Vikublaðið hevur tá bjóða kæraranum at gera eina nýggja samrøðu. Sambært leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið hevur ein miðil skyldu at rætta skeivar upplýsingar skjótast gjørligt, og tað roynir Vikublaðið eisini at gera, og bjóðar í hesum sambandi kæraranum at gera eina nýggja samrøðu, sum er meira, enn teir hava skyldu at gera sambært leiðreglunum, tá upplýsingar skulu rættast. Vikublaðið fær tó onki aftursvar frá kæraranum viðvíkjand hesum, og nevndin hevur tí ikki fleiri viðmerkingar til hetta.

Nevndin viðmerkir tó, at Vikublaðið átti at gjørt vart við, at talan er um framløgu um eitt brotsmál, og at ongin er ákærdur ella dømdur í málinum. Vísast skal til punkt 4.5 og tey fylgjandi punktini í leiðreglunum. Tað er meira ivasamt, um Vikublaðið átti at upplýst, at talan er um at framløgan er um ein mann, sum er deyður. Hetta hevði havt við sær, at ávís fólk vóru uttan fyri mistanka, men hevði hinvegin eisini havt við sær, at tað bleiv meira nágreina, hvør persónurin er, og er tað trupult í hesum ítøkiliga máli at viga tey avgerandi atlitini í hesum sambandi.

**Samanumtikið viðmerkir nevndin, at talan er um eina almenna ráðstevnu, sum Vikublaðið kann endurgeva frá, uttan loyvi og kunning til tey, sum hava framløgur á ráðstevnuni.**

**Tá talan er um eitt viðkvæmt evni, átti Vikublaðið tó at verið meira vandið í mun til innihaldið í greinini og átti at eftirkanna, um upplýsingarnar vóru rættar. Vísast kann ikki beinleiðis til eina áseting í leiðreglunum, men tað er grundleggjandi fyri fjølmiðlayrkið, at upplýsingar, som vera bornar, skulu vera sannar. Tá Vikublaðið hevur bjóðað kæraranum eina samrøðu, so upplýsingarnar kunnu rættast, vil nevndin tó ikki finnast at hesum viðurskifti.**

# Fjølmiðlanevndin - avgerðir

**Eisini átti Vikublaðið at gjørt vart við, at framløgan var um eitt brotsmál, og at ongin er ákærdur ella dømdur í hesum máli. Nevndin finst at hesum, og er hetta ikki í tráð við góðan fjølmiðlasið. Vísast kann til punkt 4.5 í leiðreglunum.**

**Annars hevur nevndin ongar viðmerkingar til málið.**